Økumenisk guðstænasti í Advent kirkjnui.
www.katolsk.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10, barna-bíbliutími og bíbliugransking. Kl 11, Gudstænasta, Jens V. Danielsen, sjónvarpsupptøka.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Silas Olofson, Rom. 9
2. Páskadagur 5. apríl kl. 18 Møti v/Torleif Johannesen. sangur Hjørdis Sunnsker insavnan til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagur 6. apríl kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn og juniorar.
Mikudagur 7. apríl kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur. Kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Bergur Debes Joensen og Hera Joensen.
Hósdagur 8. apríl kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Ann Dahl Hansen og Sverra Steinhólm.

**Filadelfia Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti
www.filadelfia.fo

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnudagin 1. páskadag møti kl. 18 v/Hjørleif Poulsen

**Listafelag Føroya**
Leygardagin 10. apríl stílar felagið fyri limaútferð til kirkjurnar í Vágunum. Heini F. Petersen, David Johannesen og I.P. Gregoriussen greiða frá. Fráferð kl. 10 frá Listasavninum, kostnaður 300 kr. Tekning í seinasta lagi mikudagin tann 6. apríl kl. 16 við t-posti til malanm@ setur.fo ella hjá kassameistara felagsins tlf. 311744 við upplýsingum um navn, telefon og t-post.
www.listafelag.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Skírishósdag 1. apríl kl. 18 Møti v/ Loytnant Finnbogi Olsen og Soldátunum Jensia og Leon Kjærbæk. Eftir møti eta vit eina kærleiksmáltíð saman.
Langa fríggjadag 2. apríl kl. 11 Morgunmøti v/ Serajantmajor Palli Petersen. Kl. 18 Møti v/ Loytnant Finnbogi Olsen og Soldàt Johanna Sofía Petersen.
Leygardag 3. apríl Frá kl. 19-22 Páskakvirra. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Páskadag 4. apríl kl. 8 Páskafrøði. kl. 9 Páskatónar á Landssjúkrahúsinum. Kl 18 Møti v/ Majorunum Anne Gurine og Daniel Óskarsson.
2 Páskadag 5. apríl Kl. 11 Morgunmøti v/ Majorunum Anne Gurine og Daniel Óskarsson. Kl. 18 Møti v/ Majorunum Anne Gurine og Daniel Óskarsson.
Týsdag 6. apríl kl. 19.30 Tvørkirkjuligt møti í Adventkirkjuni.

**Lívsins Orð**
Mánadagin kl. 17.30 Tim 5
Týsdagin kl. 17.30 Liljur
Mikukvøldið kl. 19.30 Tilbiðjan og bøn. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl.10.30 Møti v/Símun Jacobsen

**Samkoman Marknagil**
*Fjalsgøta 2, Tórshavn*
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Hini møtini og sunnudagsskúlin er avlýst á páskum. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Fríggjakvøldið kl. 18 Møti v/ breyðbróting. Barnaansing er undir møtinum. Kl. 21 Herur Jákups, ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/sunnudagsskúla. Barnaansning er undir møtinum. Verið hjartaliga vælkomin. Sí skránna á heimasíðuna
www.immanuel.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Poul Færø talar um 'Rættvísgerðing lívsins'.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti
Fríggjakvøldið kl. 18 Evangelisktmøti
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Øssur Berghamar talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing er meðan møti er.
www.ebenezer.fo

**Páskastevna í Oasuni**
Skírishósdagur 1. apríl
Kl. 19 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen, Sangur: Sigrið, Annika og genturnar.
Langi fríggjadagur 2. apríl
Kl. 10 Morgunmøti við Símun Jacobsen, Sangur: Jónfríða og Marianna
Kl. 19 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen, Sangur: Sharon Zachariassen
Kl. 22.30. Ungdómstiltak við Stephan og Anne Christiansen, Ungdómskórið í Oasuni syngur. Tá ungdómstiltakið er liðugt, verður Cafékvøld í kjallaranum.
Páskaaftan 3. apríl
Kl. 19 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen, Sangur: Zamar (úr Kelduni)
Kl. 22 Lovsangskvøld.
Páskadagur 4. apríl
Kl. 10 Morgunmøti við Paula Høj, Sangur: Tórfríð Tausen
Kl. 15 Familjumøti, Barnakórið syngur. Kl. 19 Kvøldmøti við Stephan og Anne Christiansen, Sangur: Quinto.
2. Páskadagur 5. apríl
Kl. 10 Morgunmøti við Heðin Lamhauge, Sangur: Oasubrøðurnir. Kl. 18 Kvøldmøti við Jóhan Petur Johannesen, Sangur: Páll & Judith.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Páskadag kl. 11 páskamøti.
www.gospel.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Týskvøldið kl. 20 Argjakórið venur. Kl. 20.30 Ungdómsmøti
Hósdagin kl. 11 Gudstænasta v/ Altargongd. Derhard Olsen prædikar
Fríggjadagin kl. 11 Gudstænasta v/ Bergi Debes Joensen

**Lívdin**
Týskvøldið Bønarløta kl. 20 verður á Brekku 3, Hoyvík
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin Vágur**
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið. Kl. 16 barnamøti. Mikudagin kl. 16 barnamøti
Hóskvøldið kl. 18 páskastevna V/Anna Gurine og Daniel Oskarson og fleiri
Fríggjadagin kl. 11 gudstænasta. Kl. 18 møti. Kl. 21 syng við kvøld. Anna Gurine og Daniel Oskarson luttaka til hesi páskamøtir saman við fleiri. Til øll møtini verður drekka og okkurt gott til. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Vágar**
Mikukvøldið 31. mars kl. 20 Ev. møti við Jan Joensen og Lene Løbner. Øll eru hjartaliga vælkomin.
1. páskadag kl. 10:30 Páskamøti. Byrjað verður við morgunmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin í KEDRON til okkara møtir og tiltøk.
www.kedron.fo.

**Missiónshúsið í Skopun**
Týskvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími 1. Kor. 14,34-40. Hjartaliga vælkomin.

**Saron Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti
Páskamorgun kl. 11 Morgunmøti

**Kollafjarðar Missiónshús**
Týskvøldið verður bønarløta kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Rituvíkar Missiónshúsið**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 18 Møti
Fríggjakvøldið kl. 18 Møti

**Ítróttarhøllin í Runavík**
*Heimamissiónin skipar fyri Páskastevnu í Ítróttarhøllini í Runavík 3. - 5. apríl*
Leygardagur 3. apríl kl. 20 Møti. Talari: Pól Johannesen Sangur: Bethaniakórið úr Gøtu. Innsavnan.
Kl. 22.30 Ungdómstiltak við lovsangsløtu
Páskadagur 4. apríl kl. 15 Familjumøti fyri alla oynna Christian Joensen talar Sangur: Barnakórið Strendur/ Skála, Barnakórið í Tabor á Toftum, Barnakór Glyvra kirkju. Innsavnan. Kl. 19 Møti. Talari: Símun P. Jacobsen. Sangur: Manskórið í Thabor í Fuglafirði Innsavnan
2. páskadagur 5. apríl kl. 19 Møti. Talari: Marius Jacobsen Sangur: Glyvrakórið. Innsavnan

**KFUM & K í Klaksvík**
Skírisdag kl. 18 Møti við Petur Martin Glerfoss.
Langa fríggjadag kl. 18. Still løta við upplestri og djúphugsan.
Páskadag kl. 18 Møti við Derhard Olsen, presti. Streingjakórið syngur.
Annan páskadag kl. 18 Møti við Derhard Olsen, presti. Barnakórið syngur. Dramabólkurin. Veritas framførir.

**Soli Deo Gloria**
2. páskadag kl. 18 møti.

**Vitnið, Hvalba**
Samfelagsfundir verða í Hvalbiar skúla Langafríggjadag, páskaaftan og páskadag. Byrja verður við bønarmøti skíriskvøld kl. 20 í Vitninum. Øll eru vælkomin.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
*Opið er mánadag til hósdag kl. 09-17 og fríggjadag kl. 09-16. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mikudagin
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhug.
Kl. 9 Bindiklubbur á veghæddini.
Kl. 14-17 Prát. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
**Tilhaldið er stongt frá 1. apríl til og við 5. apríl. Tilhaldið ynskir øllum einar gleðiligar páskir.**
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## Merkisdagar

**Brúdleyp**
Mikudagin 31. mars kl. 16 giftast í Sjóvar kirkju Asbjørg Norðberg og Eyðun Poulsen bæði av Strondum. Opið hús verður kl. 19 í Bygdahúsinum á Strondum, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. apríl kl. 15 giftast í Glyvra kirkju, Marika Meyevi Soukou og Kaj. J. Skipanes. Veitslan verður í sjókaféini kl. 19 fyri innbodnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. apríl giftast Randi Holm, Kvívík og Bárður Brestirson Nielsen, Saltangará. Vígslan verður í Kvívíkar kirkju kl. 15. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia kl. 18

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

# HEILSANIR



**Góði elskaði Villiam Marius**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum. Hav ein super góðan føðingardag við nógvum gávum og kakum. Vit gleða okkum sera nógv til tú verður stóribeiggi. Jesus pápi fylgir tær.
**Kærar heilsanir mamma, babba, Rannvá-Omma, Tage-Abbi og Vigdis-omma**



**Góði Tage**
Tilukku góði maður mín. Lættur og fimur ert tú, hvør skuldi trúð tí, tú rennur og hoppar sum ein unglingi, men tó álíkavæl, 75 ár eru runnin síðani tú sá dagsins ljós. Takk fyri tíðina saman við tær.
**Kærar heilsur kona tín Rannvá**



**Góði Ragnar**
Tillukku við 4 ára degnum í morgin. Vit koma í føðingardag í tykkara nýggja húsi.
**Heilsan omma, Rasmus og Peddy-fastir**